## DAGSINS MEINING

# Áhugaverdir tankar

Tað er ikki nakar nýggjur tanki, at fakfeløg í staðin fyri lønarhækkingar skulu tryggja sær ein munagóðan skattalætta. Hetta hevur verið frammi fleiri ferðir bæði her í Føroyum og í okkara grannalondum. Kjarnan í hesum máli er, at tað almenna skal lækka bæði beinleiðis skattin og avgjøldini fyrst og fremst MVG. Fyri fakfeløgini er tað sjálvsagt ikki krónutalið, sum telur, men reallønin - also tað sum er eftir at keypa fyri, tá tað almenna hevur tikið sítt.

Samgongan hevur lovað ein skattalætta uppá 240 milliónir krónur í hesum valskeiði. Hetta varð gjørt, áðrann nakar í samgonguni visti, hvussu fíggjarliga støðan hjá landskassanum var. Hetta lyftið varð givið, meðan nýggja samgongan enn trúi uppá tað, sum gamla samgongan vissaði fólkið um, nevniliga at vit høvdu ein grundleggjandi sunnan búskap. Tá gerandisdagurin kom, vísti tað seg, at soleiðis var støðan ikki. Hon var mestsum beint tvørturímóti. Alivinnan, rækjuvinnan og flakavinnan á landi vóru allar komnar á fallandi føti. Almenni búskapurin hevði tað lítið betri, og fyrsta fíggjarlógin hjá nýggju samgonguni kom út við halli. Tann næsta verður lítið mætari. Hetta er eingin tespilig støða, og samgongan hevur tikið til tey vanligu ráðini at skera niður. Men við niðurskurðinum minkar virksmið í landinum, so hetta er alt annað enn lætt.

Hóast hetta sostatt ikki er nakað einfalt mál, eiga myndugleikarnir at taka eina samráðing við fakfeløgini til tess at kanna eftir, hvat partarnir kunnu semjast um. Kann ein avtala millum landsstýrið og fakfeløgini við lønarafturhaldi tryggja eitt hægri reallønarstøði, er hetta so avgjørt eitt áhugavert alternativ til lønarhækkingar. Vandin er bara tann, at slíkar skipanir hava tað við at verða útholaðar, tá ein tíð er farin. Tá tað almenna aftur fær tørv á peningi, verður freistandi at hækka avgjøldini, síðan hækkar beinleiðis skatturin, og so er støðið máað undan reallønini. Skal henda leið við lønarafturhaldi og skættalætta haldast, mugu partarnir gera bindandi langtíðaravtalur. Tað er lættari sagt enn gjørt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Viðmerking til greinina í sosialinum nr. 123 1. juli 2004

# Hvalbingar berjast ímóti náttúruni

**John Berg**
*Ein av teimum, ið als ikki er samdur við tey "mongu fegnu" í Nesi*



Áki Bertholdsen citerar Levi Niclasen bygdarráðsformann fyri at siga, at nesfólk yvirhøvur eru fegin um tað, ið gjørt verður á Lítlibøsandi.

Búgvi sjálvur í Nesi, men havi bara hoyrt negativt um arbeiði, so hvørji tey nøgdu eru listi meg at vita. Málið hevur møguliga verið fyri á bygdarráðsfundi, so har kann helst okkurt finnast í fundarfrágreiðingini, um onkur hevur áhuga í tí.

Havi annars hoyrt sum slatur, at áheitan er komin til kommununa um, at við tað at innsiglingin til bátahylin í Nesi fyllist við sandi, skal hetta forða fyri útróðrinum - gudarnir skulu seg yvir forbarma - má vera skemt, so hetta krevur helst onga viðmerking. Sigst annars, at ætlanin er at byggja 4.- les fjórða bátahylin í Hvalba, so hatta við sandinum í innsiglingini í bátahylin í Nesi loysir seg sjálvt.

Eisini verður sagt, at sandurin forðar fyri, at eigarar í Innaru Støð fáa ikki drigið bát. Tað hevur hann gjørt í fleiri ár, og tí varð helst asfalteraður vegur gjørdur til neystini har fyri fleiri árum síðani.

Sagt verður, at tvey ár eru síðani, at grivið varð seinast. Tað er møguligt, men grivið hevur verið fleiri ferðir uttan úrslit, tað vita tey flestu.

Hvat tann eini dagurin við gravimaskinu kostar, kann helst eisini finnast í skjølum hjá kommununi, um onkur skuldi havt áhuga í tí. Hví verður tað, sum grivið er ikki flutt burtur. Er tað ikki komin nøkrum til hugs, at sandurin, ið grivin er upp fýkur ella riðar í aftur?

Skal her royna at greiða frá míni hugsan um "sandproblemið" í Hvalba.

Grótkastini á Hamranesi og Innara Rana í Nesi hava gjørt, at fjørðurin er vorðin trengri, so at trykkið inn á Jørðabakka,Hundagjógv,Tangan og Skeljalagið er vaksið.

Sandurin minkar har, men legst í Kósina og innanfyri Býargarð eins og í Innaru Støð í Nesi. Eisini hava tey 1000- tals tonsini av gróti, sum komu úr bergholinum Hvalba-Sandvík, og sum vórðu vippaði út av Reyðabarmi, havt sína ávirkan á fjørðin.

At brúka sandánna á Lítlabøsandi sum "syndabukk" kann ikki rúkast til nakað.

Sandáin rann fyrr ovast undir gørðunum, áðrenn grótkastini komu, og tá var sjógvur líka í neystakjaftarnar í Innaru Støð. At áin skal gera at sandur legst framman fyri neystini er tvætl.

Um trupulleiki er við innsiglingini í bátahylin í Nesi, er bara at senda boð eftir einum sandsúgvara. Teir verða helst lidnir við arbeiði áðrenn kaffitíð.

Áki Bertholdsen sigur í greinini, at sandurin áin, ósin og Vatnið er ein sonn náttúruperla. Haldi, flestu fólk, ið hava verið á staðnum, eru samd við honum.

Kundi verið áhugavert at fingið at vita, um hasar grótrúgvurnar, ið eru dumpaðar innanfyri Træbrúnna eru partur av projektinum við Sandánni, ella um tær eru lagdar til prýðis, nú ferðafólk leita sær hendavegin í summar.

Kundi trivið í okkurt annað eisini, men lat tað verða nóg mikið hesuferð.

# Ov fá krøv

**Óli Jákup Joensen**
*lærari*

**Aftursvar til mín góða vin Jarvin!**

Eg havi havt ta gleði at arbeiða við børnum/vaksnum í 20 ár.

Ein eygleiðing, eg havi gjørt, er, at um børnini hava eina innaru stýring,sum sigur teimum,hvat er rætt og skeivt, kunnu tey náa langt.

Sama er galdandi er fyri vaksin.

Vit kunnu tvinga børn/vaksin til at liva upp til okkara krøv(uttara stýring). Men hvat hendir,tá vit, sum møguliga tvinga, ikki eru har?

Tað áhugaverda er: Hvussu fáa vit eitt komandi ættarlið at hava eina innaru rødd, sum sigur teimum, hvat er rætt og skeivt? (innaru stýring)?

Tín kritikkur av pædagokskúlanum er, at tað verða sett ov fá krøv til starvsvenjingina!

Spurningurin er: Hvussu skapa vit pædagokar, sum seta sær sjálvum krøv?

Børnini vilja endurspegla pedagokin!

Hvørji onnur krøv ynskja tit?

Eru krøvini kanska ein eyka uppgáva?

Hon kann jú altíð stáplast upp á beinini!

Men heldur hon í tí dagliga arbeiðinum?

Eg ivist!

Men... nógvir dugnaligir pedagokar arbeiða í Føroyum í dag til gleði fyri børn og vaksin!

Nógv av teimum hava tikið útbúgving frá Føroya Læraraskúla!

Góði Jarvin tak upp samstarv við Føroya Pedagokskúla - lat ikki tilfeldigar røddir og fjølmiðlarnar stýra tær!

Við vón um gott samstarv millum lærarar og pædagokar!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til grein hjá Jógvani við Keldu

**Sunrid Hentze**

Tað var hugvekjandi at vera suðuroyingur týsdagin 22. juni, tá ið Sosialurin kom í hvørt húsarhald í Føroyum. Tað fyrsta, tú fær eyga á, er stór yvirskrift: »Suðuroyingar mugu ganga plankan út«. Tað var tað mest ótrúliga tilfarið, man skuldi lesa seg ígjøgnum. Suðuroyingar mugu leggja alla oynna í eina kommunu fyri at fáa stuðul úr landskassanum til at seta virksemi í gongd aftur her suðuri. Hvør hundan man Jógvan við Keldu halda seg vera? Tað bleiv ikki kravt av sandoyingum at teir skuldu gerast ein kommuna fyri at fáa Sandoyarloysnina. Tað vórðu heldur ikki settar kjølbromonnunum nakrar treytir, tá teir skuldu bjargast.

Hvat byr so undir, tá Jógvan við Keldu kemur við slíkum úttalilsum? Er tað nú komið alment fram og á prent, at føroyingar ikki eru suðuroyingar og at vit ikki hava somu treytir sum restin av landinum, ella er tað makt, hann er úti eftir? Hann sigur bart út: »vit kunnu gera nakað við støðuna, men vit gera einki fyrr enn tit lúka hesi krøv«. Hetta er embætismisnýtsla av grovasta slag. Hann skuldi fingið sparkið upp á standandi fót. At lata fólk í Suðuroynni liva í svartasta arbeiðsloysi, tí teir skulu hava oynna saman, tað er ikki bert fólkinum, hann misbrýtur seg ímóti, men eisini móti meginregluni hjá ALS, ið sigur, at øll, sum kunnu fáa arbeiði, skulu til arbeiðis.

So sigur hann víðari, at »alt skal skal vera har tað er best. Smyril siglir ikki meira á Vág, tunnilin millum Øravík og Hov dregur út, vegakervið millum norðaru og sunnaru helvt verður einki gjørt við, alt sum var alment, er farið á Tvøroyri, so sigur tað seg sjálvt, hvar best er at alt liggur.

Hann sigur í sama andadrátti, at smáplássini doyggja út kortini. Hatta er ein fín hugsan hjá einum politikara at hava, serliga í hesum døgum, tá ið allir búskaparfrøðingar hanga í hvørjum horni og rópa upp um útoyggjamenning. Og man spyr seg sjálvan, hvussu nógv posthús verða í Suðuroy – eitt … ?

Norðanfjørðs gera politikarar alt fyri at fáa fólkið út aftur á smáplássini, teir rinda barnafamiljum enntá eina upphædd fyri at fáa tey at flyta og skattaprosentið er lægri har. Tí teir duga at síggja vinningin fyri landið. Men hesir snævurskygdu polikararnir, vit hava, síggja ber tað, ið gagnar egnum lummum.

Við øðrum orðum: Allar tær milliónir, sum koma úr Suðuroy, hava verið brúktar í ólukkumát norðanfjørðs, men nú skal so slettis einki koma suður um fjørðin aftur. Man tað vera undirsjóvartunnilinum, ið tørvar pengar og so skal meira kroystast úr suðuroyingum?

Ein vissur fýrur royndi at útrudda eina heila rasu, men tað sær út sum um Jógvan við Keldu helst vildi, at alt sunnan fyri Hovsegg varð útruddað!

Alt gott um samanlegging, men tað merkir ikki, at økir í landinum skulu liggja brakk, tí eitt annað økið skal verða betur fyri, tí er tað tilfeldið, so skuldu nógv øki ligið sum Lítla Dímun og hvør gagnnýtsla er so í landinum?

# Svar til Starvsmannafelagið

**Jan Christiansen**
*borgarstjóri*



Tórshavnar kommuna ynskir felags reglur fyri øll, sum eru í arbeiði hjá kommununi

Vísandi til skriv frá Starvsmannafelagnum dagfest 25.06.2004 um privat ørindi í arbeiðstíð v.m. hevur Tórshavnar kommuna hesar viðmerkingar:

Høvuðssjónarmiðið hjá kommununi er, at tá tað snýr seg um privat ørindi í arbeiðstíð, herundir lækna og tannlækna ørindi og jarðarferðir, eiga somu reglur at vera galdandi fyri øll, sum eru í arbeiði hjá kommununi.

Privat ørindi í arbeiðstíð er eitt øki, sum arbeiðsgevarin hevur ábyrgdina av at skipa. Tí hevur Tórshavnar kommuna sum arbeiðsgevari sett í verk eina skipan, sum er eins fyri øll, ið arbeiða hjá kommununi. Skipanin kom í gildi 1. juli 2004, eftir at avvarandi fakfeløg í góðari tíð fingu fráboðan um hetta, og tí høvdu møguleika t.d. at royna málið í gerðarrætti.

Starvsmannafelagið vil nú ganga rættarinnar veg við málinum. Kommunan, ið áður hevur mælt felagnum til at royna spurningin í rættinum, fegnast um at felagið tekur hetta stig. Tó verður stigið tikið heldur seint, tí felags reglurnar eru komnar í gildi. Kommunan vil sjálvsagt fylgja møguligum rættarligum avgerðum.

Eftir áheitan frá fakfelagssíðu fór Tórshavnar kommuna í samskifti við fakfeløg um reglurnar um privat ørindi í arbeiðstíð, men partarnir vóru ikki førir fyri at røkka semju um spurningin. Tað sýntist ikki, sum t.d. Starvsmannafelagið hevði áhuga fyri at røkka einari felags semju um felags reglur fyri privat ørindum í arbeiðstíð.

Hóast málið um privat ørindi í arbeiðstíð nú er eitt avgreitt leiðslumál, er spurningurin, um Starvsmannafelagið frameftir er sinnað at vera við í einum konstruktivum samskifti um líknandi mál. Kommunan vil fegin hava eitt uppbyggjandi samband við felagið, men tað krevur eitt nú, at samskiftið okkara millum fer fram beinleiðis og ikki í fjølmiðlunum.

Endiliga skal Tórshavnar kommuna gera Starvsmannafelagið varugt við, at um felagið metir, at málið um privat ørindi í arbeiðstíð er brot á kollektiva sáttmálan millum felagið og Komunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, KAF, so eigur Starvsmannafelagið at venda sær til KAF við sínum sjónarmiðum og viðmerkingum. Harumframt er týðandi, at Starvsmannafelagið sannar, at spurningurin um viðurskiftini hjá dagrøktarum eisini liggur hjá KAF.

Samskiftið við Starvsmannafelagið í seinastuni hevur víst, at fjølmiðlarnir fáa boð til Tórshavnar kommunu, áðrenn kommunan sjálv fær tey. Tí sendir kommunan fjølmiðlunum avrit av hesum brævi samstundis sum tað fer til Starvsmannafelagið.

# Tora fyri útlendingar

Í juli mánaði fer Tora Tourist Office at halda reglulig kunnandi møti fyri útlendingar, sum koma í ferðaørindum. Ætlanin er at kunna um tiltøk og møguleikar í Føroyum. Útlendingar skulu kenna tann føroyska "way of life," sum tikið verður til í tíðindaskrivi. Hetta skal gerast saman við ferðaleiðarum á Tora Tourist Office.

Í hesum sambandi bjóðaði Tora Tourist til vælkomst í gjár, mánadagin. Umboð fyri Tora Tourst vóru Sámal Bláhamar og Uffe Helsing Andersen, sum er instruktørur á guideskúlanum Service & Co. Uffe Helsing Andersen er rættur globetrottari. Hann hevur í tíggju ár ferðast kring heimspartarnar Europa, Afrika, Asia, USA og Suðuramerika.

**-hkm**



*Sámal Bláhamar*

# Grovar, ógrundaðar skuldsetingar

**Tormóður Stórá**
*formaður*



Í Sosialinum fríggjadagin er samrøða við stjóran á Restorffs Bryggjarí, Johan Mortensen, sum er firtin um, at øl hansara ikki verður selt í Føroyahúsinum i Keypmannahavn. Í samrøðuni verða settar fram grovar, ógrundaðar og beinleiðis ósannar skuldsetingar móti leiðaranum í Føroyahúsinum, og skal tí verða komið við hesi viðmerking.

Johan Mortensen hevur rætt í, at tað í løtuni ikki verður selt øl frá Restorffs Bryggjarí í Føroyahúsinum. Um orsøkirnar til tað verður víst til viðmerkingina, sum leiðarin í Føroyahúsinum, Martin Fjallstein, fekk høvi til at gera í sama blaði. Hetta hevur stjórin á Restorff fingið at vita áður, men tá honum ikki hóvar svarið, leggur hann í staðin leiðaran undir óheiðurligt virksemi.

Tá Johan Mortensen førir fram, at talan er um "alment svans", og at leiðarin selur øl fyri "egna rokning og vinning", at hann "nýtir sessin til privat áhugamál" og at tað eru "privat og peningalig áhugamál" sum eru avgerandi, so er talan um beinleiðis ósannar skuldsetingar.

Vert er at sláa fast, at Føroyahúsið í Keypmannahavn er ein sjálvsognarstovnur, sum ræður sær sjálvum, eisini um hann fær almennan stuðul. Hetta vevur Johan Mortensen upp í ein ellubita, og fær tað til, at tann sum fær almennan stuðul eisini pliktar seg til at keypa frá øllum teimum, sum framleiða somu vøru.

Dugi ikki at síggja upprunan til hesar illgitingarnar um at leiðarin í Føroyahúsinum skal vera farin undir at reka privata vinnufyritøku, sum skal liva av at selja vøru til Føroyahúsið. Kanska hevur Johan Mortensen fingið tað skeivt í hálsin, at leiðarin hevur fingið almenna góðkenning til at innflyta øl. Søguliga frágreiðingin um tað er, at føroysk øl (frá Føroya Bjór) í skjótt nógv ár hevur verið selt í Føroyahúsinum og hevur verið ein eftirspurd vøra.

Í fleiri ár varð hetta keypt frá einum innflytara á Vesturbrúgv, men tá hon doyði og fyritøkan gavst, bar ikki til at keypa føroyskt øl í Danmark. Kannað varð tá um tað var møguligt hjá húsinum at innflyta beinleiðis (og soleiðis sleppa undan millumhandlara), men hetta kravdi, at onkur persónur varð góðkendur av myndugleikunum sum øl-innflytari. Avrátt varð, at leiðarin skuldi góðkennast sum innflytari, men tað kundi líka so væl verið onkur úr t.d. nevndini í húsinum. Nevnast kann, at tað eisini er í øðrum viðurskiftum, at neyðugt er við persónligari góðkenning í sambandi við tað virksemi, sum Føroyahúsið rekur. Men um tað so er nevnd ella leiðari sum leggur persónligan rygg til, so er tað fyri at fáa virksemið í Føroyahúsinum at bera til, og ikki fyri at lívga sær sjálvum.

Góðkenningin sum innflytari var sostatt í eginleikanum sum leiðari í Føroyahúsinum og ikki sum privatur umboðsmaður. Hetta hevur verið gjørt tey seinastu seks-sjey árini, og hava vit ikki sæð nakran trupulleika í tí.

Tað harmar okkum almikið, at ein buldrutur sølumaður, sum kennir seg settan til viks, á hendan hátt sleppur at dálka leiðaran í Føroyahúsinum, Martin Fjallstein, sum í fleiri ár hevur lagt alla sína orku í truplu uppgávuna at skapa eitt fyrimyndarligt Føroyahús í Keypmannahavn. Harmiligt er eisini, at Sosialurin so ókritiskur letur seg brúka í hesi buldur og brak marknaðarføringini og fyllir forsíðu sína við heilaspuna.

**Vegna nevndina fyri Føroyahúsið í Keypmannahavn**
**Tormóður Stórá, formaður**